Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	2. mai 2024
Mál nr.:	24/10306-1
Málsviðgjørt:	TVR
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	24.04.2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at veita landskassastuðul til Oyggjaleikirnar, sum verða í Føroyum í 2027

§ 1. Landsstýrisfólkið fær heimild til at lata upp til 15 mió. kr. í landskassastuðli til Ítróttasamband Føroya til fyrireiking av Oyggjaleikunum í Føroyum, sum verða í 2027.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2027.
Stk. 2. Samstundis sum løgtingslógin fær gildi, fer løgtingslóg nr. 61 frá 30. apríl 2018 um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum úr gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Avgerð er tikin um, at Føroyar longu í 2027 skulu hýsa Oyggjaleikunum, sum er fýra ár fyrr enn upprunaliga ætlað.

Ítróttasamband Føroya (ÍSF) hevur víst á tørvin á beinleiðis stuðli úr landskassanum til at fyrireika Oyggjaleikirnar í 2027. Sagt verður, at tey í fyrstu atløgu hava nokk av peningi til at byrja fyrireikingarnar, haruppií at seta verkætlanarsamskipara, men at tey frameftir fáa tørv á eini játtan til endamálið. ÍSF metir, at tað eftir ætlan verða brúktar 10 mió. kr. í 2027, og at ætlanin er at brúka 2,5 mió. kr. í ávikavist 2025 og 2026.

Løgmansskrivstovan hevur viðgjørt málið saman við Fíggjarmálaráðnum, og nevndu stjórnarráð eru komin ásamt um, at tað er ikki nokk við landskassatrygd, soleiðis sum ásett er í løgtingslóg nr. 61. frá 30. apríl 2018 um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum. Sostatt má játtan verða til endamálið nevndu ár, men henda heimildarlógin er neyðug til tess at geva bindandi tilsøgn yvir fleiri fíggjarár, sum ásett er í játtanarskipan landsins.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva í dag er løgtingslóg nr. 61 frá 30. apríl 2018 um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum, ið heimilar landsstýrisfólkinum at veita fíggjarliga trygd fyri, at Oyggjaleikirnir kunnu verða í Føroyum í seinasta lagi í 2029, og trygdin kann ikki fara upp um í alt 10 mió. kr.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at geva ÍSF tilsøgn um stuðul til at fyrireika Oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Farið verður frá eini landskassatrygd upp á í mesta lagi 10 mió. kr. til at gera eina heimildarlóg, ið heimilar landsstýrisfólkinum at veita landskassastuðul upp til 15 mió. kr. árini 2025, 2026 og 2027.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Sambært ÍSF fara Oyggjaleikirnir at kosta eini 22 mió. kr. Sambært ÍSF fer samlaða fíggjarætlanin til at samskipa, marknaðarføra, seta og at enda Oyggjaleikirnar, til ferðing og samskifti. Tað verður lagt upp fyri inntøkum frá atgongumerkjum og sponsorum á eini 7 mió. kr., og tí resta 15 mió. kr. í, fyri at øll verkætlanin er fíggjað. Við uppskotinum átekur landið sær tí fíggjarligar skyldur at stuðla Oyggjaleikunum við upp til 15 mió. kr. Eftir ætlan verða 2,5 mió. kr. av stuðlinum útgoldnar í ávikavist 2025 og 2026, og í mesta lagi 10 mió. kr. í 2027. Um hugsað verður um tað, ið kemur aftur til landið, hava ÍSF og Visit Faroe Islands við støði í hagtølum frá Sólarmyrkingini mett, at man lættliga kann rokna við, at ferðandi t.e. íðkarar, venjarar og áskoðarar úr øðrum londum koma at brúka áleið kr. 2.000 um samdøgrið til ferðing, gisting, uppihald o.a. ÍSF væntar, at áleið 3.000 fólk úr øðrum londum koma at luttaka í Oyggjaleikunum, og áleið 1.000 fólk úr øðrum londum koma at hyggja at Oyggjaleikunum, sum fara at vara í átta dagar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur umsitingarligar fylgjur fyri landið við tað, at fíggjarfólkini í Almanna- og mentamálaráðnum skulu fylgja gongdini og hava vanligt játtanareftirlit við pengunum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Oyggjaleikirnar fara helst at hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna við nógvum avleiddum virksemi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Sambært ÍSF verður væntað, at leikirnir verða hildnir í Tórshavn, Vágunum, Klaksvík og Runavík. Tó kann væntast, at einstøk tiltøk verða aðrastaðni í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri ítróttina og ítróttarfelagsskapir sum heild.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

1) Hoyvíkssáttmálin

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar avleiðingar fyri EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Nei, uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Nei, uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Nei, uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Nei, men uppskotið gevur landsstýrisfólkinum í almanna- og mentamálum heimild til at veita landskassastuðul árini 2025-2027 til Oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Ja	Ja	Ja

Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Uppskotið heimilar landsstýrisfólkinum at veita bindandi tilsøgn til Ítróttasamband Føroya um landskassastuðul yvir trý fylgjandi fíggjarár til Oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027. Ætlandi verður stuðlað við 2,5 mió. kr. í 2025, 2,5 mió. kr. í 2026 og 10 mió. kr. í 2027.

Til § 2
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 61 frá 30. apríl 2018 um landskassatrygd fyri Oyggjaleikir í Føroyum.

Lógin fer úr gildi aftur 31. desember 2027.

Almanna- og mentamálaráðið 2. mai 2024.

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen